**8.b flokkur**
**Miðvágs- Sandavágs skúla**

Ungdómstingið

**Ungdómstingmál nr. 2/2012: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ferðslu (prutl)**

# Uppskot
# til
# løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ferðslu (prutl)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 65 frá 9. september 1963 um ferðslu, sum kunngjørd við løgtingslógarkunngerð nr. 14 frá 2. mars 1988, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 49 frá 11. mai 2009, verður gjørd henda broyting:

Í § 18, stk. 3 verður "16" broytt til: "15".

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, hon er kunngjørd.

## Viðmerkingar

Skiljilinjan millum børn og vaksin verður sett at vera 15 ár, tí meta vit tað vera natúrligt at seta aldursmarkið fyri at koyra prutl niður í 15 ár.

Tað er sera stutt ímillum skutarakoyrikort og koyrikort til bil og 15.000-30.000 kr. eru sera nógvir pengar at nýta til ein skutara, sum tú vanliga bert brúkar í umleið tvey ár.

**Á Løgtingi, tann 6. februar 2012**

Tóra Bláhamar á Løgmansbø Høgni Egilstoft Nielsen Sascha Due Niclassen